

# Hattarvíkar kirkja 100 ár

Aftur í søguna at fara
er ikki sum at siga tað bara.
Har vit einki vita,
hava vit lyndi til at gita.

Tá vit í Halgubók lesa
hoyra vit søguna hesa:
At andin yvir vøtnum lá,
áðrenn tú hesar oyggjar sá.
Men hvat vita vit við vissu um lond
frá skaparans hond ?

Frá sagnum hava vit mynd,
at Fugloyggin rak fyri vág og vind,
hetta hildu menn vera synd,
tí vøkur var hvør lind
frá fjøru til fjallatind.

Tessvegna menn brúktu megi mesta
hesa flotoyggj í botn at festa
við snildi teir bóru so í band,
at tveita stál upp á land.

Men har var einki at gera,
ein kundi líka so gott lata vera,
tí fram við bakka stóð riðil av trøllum,
sum loftaðu øllum.
Alt, ið kom á land, varð á bláman tveitt
alt fyri eitt.

Soleiðis rak oyggin til og frá
eins og friðleyst oyggjastrok má,
inntil prestarnir boðsendir vóru
og til arbeiðis fóru.

Ein dagin oyggin kom uttan av havi,
teir hálshvítu fingu tað strævið.
Tá teir vøkru sjónina sóu,
teir út til oynna róu,
óivað teir eisini bóðu.
Á hjørtum teirra lógu
ynskir um eydnuna góðu.

Teir seg ei spardu,
teir stardu og stardu
hesir væl lærdu.

Teir vistu,
at um teir oynna úr eygsjón mistu
var vandi á ferð
fyri miseydnaðari gerð.

At enda teir komu oynni so nær
at til bar
hjá einum presti at taka
eina bíbil og hana blaka
á land har
og fast var.

Prestarnir, ið jú duga gand,
fóru síðan upp á land.
Og kunnu vit teim almikið takka,
og teir megnaðu trøllini á bakka,
at ganda um til túgvur,
um søgnin ikki lúgvur.
Hesar túgvur, ið tú enn finnur,
okkum um hetta minnir.
– – –
Her hava vit frætt,
at eitt er søgn,
men hvat er satt?
– – –
Satt er,
at kirkjur hava verið her,
men nær,
teir bygdu tær,
og tann fyrsta liðug var,
kann eingin siga mær!

Nei, ringt er at tíðarfesta,
hóast ein ger sítt besta.

Og tú eigur heldur onga trygd
fyri, hvussu kirkjan veruliga var bygd
fyrr enn
Fríðrikur 4. til Føroya sendi menn
til millum annað
hetta at kanna.
1709 er árstalið rætta,vit um hetta frætta.
(Tað var so hatta!)

Tað vil taka alt ov langa tíð
at nevna alt um hetta kirkjusmíð.
Hvussu mátini vóru
í sjálvari kirjuni og innar í kóri,
og ikki minni,
um, hvat ið tú á sinni
fann í kirkjuni inni.

Men vit vita í hvussu so er tað,
at kirkjurnar vóru gjørdar av grót og flag,
og at tekjurnar tá
vóru av strá.
Tí mátti ein sær væl í minni leggja,
at kirkjan, bæði innan- og uttanveggja,
mátti umsitast bæði virðiliga og væl,
annars stóð livitíð hennara upp á spæl.

Í bókini »Teir byggja land« kunnu vit lesa
um kirkjuna á Kirkju í 1820 – frágreiðing hesa,
at kirkjan har
í sera ringum standi var
og trongdi harðliga
til at umvælast snarliga.

Bátavanlukkan í 1818 gjørdist sera svár,
ikki bert runnu sorgartár,
men hetta tók stuðlarnar undan Kirkjubygd fyri mong ár,
og er hetta sagt stutt,
høvuðsorsøkin til, at kirkjan til Hattarvíkar varð flutt.

Ikki lætt at vera smiður,
tí úr Havn skuldi førast allur viður.
Hetta var sum sagt neyðartíð,
men við strev og stríð
stóð kirkjan í Hattarvík liðug í 1833 (18-tríati og trý)

Nágreiniliga 100 ár gingu
áðrenn kirkjumenn aftur kirkju fingu,
á grundina gomlu teir hana settu,
trygt stóð hon – eins og hin fyrra – á hesum bletti,
grundað á trúðar-kletti.

Um vit Hattarvíkar søgu gjøllari kanna,
kunnu vit millum annað sanna,
at í katólskari tíð
hevur bønhús verið bygdini í.

Hetta bønhús stóð sum ein varði
uppi á Skarði.

Men ei verður sagt frá kirkjugarði!
Nei, við teim deyðu varð til Kirkjar farið.
Og har hevur verið mangt eitt knoss,
altíð – fyrst upp á Kross,
síðan á Líkheyggin børa var sett,
til menn høvdu mett,
at teir, ið bóru,
høvdu rindað møðina stóru,
áðrenn tigandi fram teir leiðina fóru.

Um gomlu kirkjuna á hesum stað
vita vit lítið og einki á dag,
men eitt er søguliga satt,
havi eg frætt,
at har, hon stóð, hevði áður verið rætt.
Uppi í Húsi, ovast í bønum,
var hon bygd av hondum kønum.

Í 1834 – í bestu summartíð
kom Føroya próstur at kanna hetta smíð
har hann skifti orð
við Andras í Suðurstovu og Sakaris har Norð.
Uttan var alt, sum tað átti at vera,
men innan – var enn nógv at gera.
Skrivlig frásøgn tykist tíverri eingin at finnast,
men fleiri kunnu tó ymist minnast.

Sagt var
av onkrum, ið vitjað hevði har:
Inngongd og forkirkja var vestari endi,
ið mót Kellingará vendi,
og viðkomandi eisini segði,
at ovara síða var grótveggur,
ið eingin vindeygu hevði.

Tekjan var so lág,
at hana kundi ein seta seg á,
og á niðaru síðu tú 4 vindeygu sá.
Kórið var skildrað frá
við vælvaldum
vakurt útskornum snældum
og tó at tvey smá vindeygu har vóru
var myrkleitt innar í kóri.

Eingin kann minnast,
at nøkur altartalva mundi finnast.

Kirkjan var so lág,
at tá,
ið talvan gekk,
klokkarin hana fekk
upp á loftið til tey, ið sótu har
við at rætta hana yvir høvdið á sær!

Lágt var eisini tornið teir siga
við ongum stiga,
tí mátti klokkarin / eins og frægur bakkamaður
bein og hendur brúka
fyri arbeiðið sítt at lúka.
Íðin í sínum yrki
ringdi hann trúliga til kirkju

Tann kirkjan, ið har stóð,
var við tíðini vorðin minni góð.
Tíðarinnar tonn, vindur og veður,
ávirkan hevur
og sítt krevur.

Í 1899 teir nýggja kirkju byggja
fyri kirkjunnar framtíð at tryggja,
slíkt kann ei á láni liggja.

Og nú gott hundrað ár á rað
hevur hon verið og er framvegis tað stað
har deknur lesur lestur
ella tænari er prestur.
Har tú á hvørjum halgidegi
í sorg sum í gleði
kann finna linna
ugga, og megi
í Harrans orði
og við altarborðið.
– – –
Latum okkum at enda minnast undanfarnu ættarlið,
sum tóku hesu mongu umrøddu stig,
vit lýsa yvir teimum Guds frið.
Samstundis takka vit tykkum, ið tóku við,
sum hildu áfram í teirra anda,
sum vanligt er her til landa.
Latum okkum saman standa
og kirkju okkara verja
mót øllum, ið á hana herja
og vilja boðskap hennara skerja.
– – –
29. oktober í fjør, tá kirkjan fylti hundrað,
móti tað óivað onkran undra,
at kirkjan ikki helt føðingardag,
men hetta kom tíanverri ikki í lag,
orsøkir vóru av ymiskum slag.

Men so ár 2000 -9. (nígginda) í sjeynda
vit mong í Hattarvík lenda
at minnast dagin henda.

Vit leggja serliga merki
til hetta frálíka listarverkið,
gávuna stórbæru,
kirkjuni til heiðurs og æru,
altartalvuna, ið kórveggin prýðir,
har skapanin í huga fram stígur.

Øll góð ynski um Guðs signing.
Hjartaliga tillukku.

**Erland Beder**



# Rúni Brattaberg sang sum ein rættur basssangari

*Hóskvøldið 27. juli trein Rúni á pallin í fimleikarhøllini í Fuglafjarðar skúla og lætti ljóðið av. Á Varmakeldu var svenski bariton sangarin Håkan Hagegård og sang. Hetta var frálíkt upp undir eina stevnu — Varmakeldustevnu, at verða lyftur uppfrá og kenna seg í einum tómum rúmi millum aldargamalt dust frá fjarum stjørnum og vera ein partur av hesum*



*Rúni Brattaberg hevur útbúgvið seg uttanlands sum operasangara og nú gleðir hann landsmenn sínar við síni djúpu rødd*

*mynd: Jens K. Vang*

Rúni kom sunnan úr ljósinum — hann er vágbingur, norður í myrkrið og kveikti kertur millum stjørnudust og djúpar basstónar. Hetta var upp undir Óvlavsøku, og var stjørnudustið so tætt sum aldri áður. Sólin hevur oyst glarstrálur av sínum aldargamla likami út yvir føroysku basaltfláirnar í ein mánaða, og hvør skuldi so dittað seg til at lætta ljóði av, tá ið so var? Jú, tað gjørdi Rúni. Hann bardist við síni frálíku rødd ímódi lýggjum vindi, sólblankum firðum, grønum líðum, sólturkaðum skarðlendi í einari fimleikarhøll í Fuglafjarðar skúla á hásumri.

Rúni er vælbygdur. Ein væl tilevnaður basssangari. Hann smíðaði løtuna so væl, eins væl sum Håkan Hagegård. At vera einsamallur á palli og syngja skal dirvi og mansevni til. Hesin róligi og hóvligi sangarin, reið allar snertar av sær og fekk tær bláu summarskorðarnar at livna í grønum torvum, ið spegladu sær í tí sjósalta havi kring oyggjarnar.

Hetta var sum at fletta ein góðan veðr á heystardegi. Glarfitin smurdi knívin… nei, eg meini røddina, meðan Shcubert var tummaður. Der Schiffer, Nachtstück og Erlkönig. Rúni reið á eini summaraldu, meðan flettingin var. Ja, ja, ja, á, á, á, Rachmaninov, hann er ikki so lættur at skiva, og so at gera tað á russiskum. Nei, eg má siga tað, Rúni, tú ert ein knassi! Kroppur, eygu, høvur og so teir fýra fingrarnir á høgruhond tætt við knæsbótirnar livdu ímillum kropp, krov og stjørnudust, og so Regin Dahl og Mussorsky! Her var eingin hýggjuskotin rognadrýlur at ilnoytast inn á. Nei her var ein føroyingur, sum gav Regini og Muss-orsky tann rætttaa dámin og rætta smakkin.

Tá ið tú flettir, er mannagongdin nøkunlunda eins kring oyggjarnar. Smá frávik kunnu verða, men ikki av týdningi. Her hjá Rúna varð svavt, tummað, loyst, skivað og fótamørðurin skorin alt saman so hegnisliga eins og hjá einum rættum flettingarmanni.

Hóast eg lítið skilti av tí russiska tekstinum, hóvaði mær best hesi løgini. Her kom røddin hjá Rúna best í ljóði sínum til sín rætt undir hesi musikalsku fletting á hásumri.. Rúni hevur ein sera góðan djúpan tóna og lyftir henda botn við sær, tá ið hann kemur í hæddina. Russikir bassangara hava verið tiltiknir við sína ljóðgóðsku, og tað skal vera ein góður bassflettari, ið fer í holt við bassløgini, hjá russiskum tónasmiðum. Sjálvandi fall einki av tá ið vilini á Sibelius, Schumann, Mozart og Montiverdi vórðu drigin og var eins feitt her sum hjá teimum russisku skaldinum, men mín meting er, at tað vigaði væl betur hjá russunum enn hjá hinum evropeisku tónaskaldunum. Ikki soleiðis at skilja, at nakað fall av ella, tá ið vigað varð, at tað var millum kross og hosu, nei, hetta er bara ein meting, og hvat einum dámar.

Rúni sang alt uttanat - á russiskum, svenskum, týskum og føroyskum. Hetta er ikki hvøns mans føri at standa einsamallur á palli, tá skal alt hanga saman. Her var nógv og forvitnisligt havt á lofti ein fjølbroytt skrá, rúgvismikil og dygdargóð. Væl kom Rúni frá hesi uppgávu. Ja, hann er úr Vági og hevur traðgað sínar barnaskógvar í Ljómi. Jú, jú grør um gangandi fót, men svultur er sitandi kráka.

Tá ið krovið kom upp at hanga, var vektin góð.

Hans-Otto Ehrström hevði klaverfylgisspælið. Hann var ein fram úr góður klaverleikari, ið dugdi at fylgja Rúna í øllum hansara "lótum"- byggja uppundir ljómin í røddini og fylgja tí musikalska renslinum í tónleikinum og ikki at gloyma mussiska andanum, sum er í øllum tí, sum skapað verður. Her var alt, sum tað skuldi verða. Hann hjálpti væl til við flettingini.

Tú vart leysur uppfrá – millum fornar tinnuglóðir, sum komu úr tí ævigu rúmd í einum tómum rúmi við sangi og spæli, sum gav tær gott blóð upp undir Ólavsøku ár 2000. Góða eydnu, Rúni Brattaberg og takk fyri eina góða fletting.

**Frits**


**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –**nógv model!'**
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –**óteljandi møguleikar!**
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

**Kaj Andreasen & Co**

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820


# Hálsaði um

Hálsaði um frá Valhøll til himmiríki:
og ólavsøka í kjalarvørr so prúð,
vanabundin er kirkjuferð og tingferð,
oyggjafólk halda leiðina og sína trú.

Árliga leitaði á fund hennara;
og hitti ólavsøku í ymsum tíðum,
reikaði um gamlar gøtur í Torshavn,
og Gongin sum høvuðsgøta á fótum.

Hon helt áfram við góðum alvi;
ólavsøka er lívfør enn á døgum,
síðan hon fylgdi við kirkju síni,
niðan eftir helluni á ungum árum.

Áravørrur vørraði av sonnum um Nesið;
og ólavsøka fór inn í bátin,
kappróður er søgufróður, út í æsir
bátur og manning – drigin í leikin.

Fólk og fæ leikti um leikvøll;
og ólavsøka niðan um garðin fer,
svalaði av sær fram við ánni,
meðan ósi helt áfram í umferð.

Kvæði ljóðar um áarlok á midnátt;
ólavsøka í hæddini á hesum sinni;
hon tekur um enda við songi,
kvæði og dans goyma í minni.

Bjørgvin 22. juli 2000, Noreg

**Ingi Toftatún**